Viðmerking:

# Frá kollektivari ábyrgd til landsstýrismannaábyrgd

Ein tann mest íðkaða ítróttargreinin í Føroyum man vera tann at klikkja niður á almennu umsitingina. Og tað er bæði høgur og lágur, tey, sum áttu at vita betur og tey, sum ikki hava so góðar fyritreytir fyri at meta um tað, men bert syngja við í kórinum, tí at hini syngja fyri. So løgið tað ljóðar, so eru politikkarar næstan teir ringastu, og niðurlagið er fyri tað mesta, at almenna umsitingin er ov stór og ov dýr, og at fólkini, ið har sita hvørki duga ella tíma at gera nakað til nyttu.

Nýklakti journalisturin Edvard Joensen skrivaði 2. og 4. mars í Sosialinum eina grein um tær bygnaðarbroytingarnar í landsstýrisumsitingini, sum undanfarna landsstýri við Edmundi Joensen sum løgmanni gjøgnumførdi frá 1995. Hann vísir til, at ein kostnaðarmeting, sum fyrrverandi fiskimálastjórin Kjartan Hoydal hevur gjørt vísir, at rakstrarkostnaðurin fyri meginfyrisitingina er tífaldaður frá 1995 til 1999.

Sjálvur hevur Kjartan Hoydal eina grein í Dimmalætting 10. mars, har hann m. a. hevur eina tabell, sum vísir tøl burtur úr fíggjarlóg fyri 1995 og uppskoti til fíggjarløgtingslóg 1999. Har er hann komin til, at í 1995 kostaði meginfyrisitingin 19,5 mió. kr., og í 1998 kostaði hon næstan 46 mió. kr. Haraftrat vísir hann á, at til flyting av aðalstýrum vórðu nýttar 27 mió. kr. í 2 ár.

### Gamla umsitingin primitiv

Nú er at minnast til, at tá ið Kjartan Hoydal enn var úti i landsstýrinum sum ovasti embætismaður fyri sína deild, fiskivinnudeildina, tá høvdu vit eina lutfalsliga primitiva umsitingarskipan í landsfyrisitingini. Tað vóru seks deildir við hvør sínum deildarstjóra og nøkrum fáum fulltrúum undir honum. Haraftrat vóru so nøkur skrivstovufólk, sum røktu m.a. tær týdningarmiklu tvørgangandi funktiónirnar. Tá høvdu vit landsstýri við landsstýrismonnum, sum høvdu kollektiva ábyrgd, og tað var ein kollektivur trupulleiki, at tað var ein alt ov lítil kapasitetur í umsitingini at fáa vanlig mál málsviðgjørd og avgreidd, fyri ikki at tala um, tá ið lógaruppskot og aðrar fyriskipanir skuldu útarbeiðast. Eg taki ikki munnin ov fullan, tá ið eg sigi, at landsstýrismenn mangan kendu seg sum slavupískarar, tá ið teir hildu seg vera noyddar at ganga hart á teir neyðar fulltrúar, sum vóru ovbyrjaðir frammanundan, fyri at kroysta teir til at loysa eina uppgávu, sum politiskt hevði bráðskund. Tí hava allir landsstýrismenn seinastu tjúgu árini ynskt at fáa eina betri virkandi umsiting, og tað merkir m.a. eisini at fáa fleiri fólk at avgreiða ta vaksandi uppgávumongdina.

### Skiftið til aðalstýri

Eitt av meginkrøvunum til politikkararnar og serliga til landsstýrismenninar hesi seinastu árini hevur verið, at teir skulu skipa fyri rationaliseringum og effektiviseringum á teirra umsitingarøki. Hetta hevur ikki minst verið eitt krav til almennu fyrisitingina. Fyrisitingin í Tinganesi hevur síðani nýskipanina í 1948 verið skipað við einum skrivstovustjóra sum ovasta embætismanni , og undir honum komu so nakrir fulltrúar, sum gjørdust serkønir á ávísum økjum, men annars skuldu kunna átaka sær allar møguligar uppgávur.

Ein broyting var gjørd mitt í áttatiárunum, tá ið umsitingin varð býtt upp í deildir við einum deildarstjóra á odda. Tíverri varð eingin ovasti leiðari settur í starv, og tessvegna varð opið fyri einum ávísum tendensi, sum vit kenna úr djóraheiminum, at teir við teimum størstu hornunum royna at kradda sær valdið. Hartil er at siga, at viðurskiftini innbjóðaðu heilt einfalt til eina slíka gongd.

Tað landsstýrið, sum tók við um miðan september 1994, var á einum máli um, at neyðugt var at gera nakað við málið, eisini tí, at nýggj stýrisskipanarlóg var komin í gildi, og reglan um landsstýrismannaábyrgd kom í gildi um eitt ár. Málsøkið hoyrdi undir løgmann, og hann legðist ikki á boðini og fór at leita eftir einum, sum skjótt og væl megnaði at koma við einum uppskoti til bygnaðarbroytingar, sum landsstýrið so kundi seta í verk.

Úrslitið kenna øll. Finn Norman Christensen, sum hevði ávísar royndir á økinum fekk uppgávuna litna upp í hendur. Tað má sigast at vera eitt satt bragd, at ein maður, sum var lutfalsliga ókunnugur við føroysk viðurskifti, upp á eitt ár megnaði at fáa eitt so nágreint innlit í føroyska almenna umsiting og síðani koma við eini loysn, sum vit í dag hava umskipað alla almenna fyrisiting eftir.

Tað er væl skiljandi, at ávísir politikkarar hava andøvt ímóti, at ein sambandsløgmaður framdi og enntá bað ein dana standa fyri nýskipanini. Tað er eisini skiljandi, at ávísir høgtstandandi embætismenn hava ilt við at svølgja umskipanina. Tað snýr seg eisini um høvdingadømi, sum vórðu gjørd til jalladømi. Eg veit ikki, um føroyingar eru serliga seintfatandi, og at teir skulu hava alt inn við skeið, ella um teir bert hava ilt við generelt at góðkenna broytingar, men ákærur um at fáa smoygt niður yvir høvdið, og ikki at vera nóg væl kunnaðir frammanundan, loynivirksemi o.a. er næstan eitt fast niðurlag, tá ið talan er um okkurt nýtt.

Tað sum Finn Norman Christensen gjørdi, var heilt einfalt at sláa departementsfunktiónina (sum var landsstýrisfyrisitingin úti í Tinganesi) og direktoratsfunktiónina (almannastovan, landsskúlafyrisitingin, gjaldstovan, líkningarráð o.s.fr., sum lógu runt í býnum) saman til eitt aðalstýri undir landsstýrismanninum, og harvið skuldu verið framúrskarandi møguleikar fyri rationaliseringum og effektiviseringum.

### Talfusk

Útrokningunum hjá Kjartani Hoydal eru lítið og einki høpi í. Tað má undra mangan annan enn meg, at hesin faðirin at fullveldinum in spe kann hava loyvt sær at fara so óvandaliga um taltilfarið og harvið gera seg sekan í grovum rangsnúgvingum. Tað hevði als ikki verið neyðugt, tí øll vita, at almenna umsitingin virkar mangar ferðir betur enn áður, og at tað eisini skyldast, at fleiri nýggjar funktiónir eru tiknar upp. Og tað kostar.

Til dømis sigur hann, at í undirvísingar- og mentamálum er umsitingin vaksin frá 1,345 mió. kr. í 1995 til 11.507 mió. kr. í 1998. Hetta sær jú ógvuliga dapurt út fyri skipanina hjá Norman Christensen. Men sannleikin er tann, at Landsskúlafyrisitingin, sum í 1995 kostaði 8.612 mió. kr. er niðurløgd sum direktorat og løgd til Undirvísingar- og mentamálastýrið og er uppi í teimum góðu 11 milliónunum. Haraftrat eru mentamál eisini komin undir hetta aðalstýrið. Tað vóru tey ikki áður. So hetta er talfusk, so tað forslær.

Í uppskotinum til fíggjarløgtingslóg 1999 stendur um Almanna- og heilsumál m.a.: ”Bygnaðarbroytingarnar innan almanna- og heilsustýrið hava ført við sær, at fleiri funktiónir eru fluttar inn í stýrið. Hetta merkir, at starvsfólk, ið áður hava røkt ávísar uppgávur úti á stovnunum, nú flyta til stýrið. Útreiðslurnar til løn og rakstur eru tí samsvarandi minkaðar á m.a. Sjúkrahússtjóranum, Landssjúkrahúsinum og Almannastovuni og fluttar yvir í stýrið.” Í uppskotinum fyri 1998 stendur: ”Í samband við nýggju Stýrisskipanarlógina, yvirtekur Almanna- og heilsumálastýrið í 1998 fleiri uppgávur, sum t.d. starvsfólkamál, sum higartil hava ligið hjá Landsskrivstovuni.”

”Nær fór kostnaðurin av umsitingini at vaksa?” spyr Kjartan Hoydal. Við tí talmanipulatión, sum hann nýtir, er ikki ringt at gita, at Edmund Joensen fær skyldina. Nakað heilt annað er, at tað hevur kostnaðurin altíð gjørt; men við teimum nýggju bygnaðarbroytingunum skuldu vit kunnað væntað, at vit fingu eina betri tænastu fyri eina lægri hækking í kostnaðinum. Og tað er júst tað, sum vit longu nú kunnu staðfesta.

### Stýrisskipanarlógin

Edmund Joensen vísti á í sínum viðmerkingum til greinina í Sosialinum, at ein orsøkin til vøksturin í almennu umsitingini var nýggja stýrisskipanin. Hetta vísir Kjartan Hoydal aftur og vísir til, at um táverandi løgmaður hevði spurt táverandi umsitingina um henda spurning , høvdu 9 av 10 sagt honum, at stýrisskipanin í sjálvum sær ikki kravdi nakra broyting í umsitingini. Eg eri púra samdur við Kjartan Hoydal, at soleiðis høvdu tey svarað, men eg hevði aldri í verðini hugsað mær at farið at spurt tey fólkini tann spurningin, sjálvandi høvdu tey ikki sagt, sum í ævintýrinum hjá H. C. Andersen, at tey ikki ’dugdu til sítt embæti’, tí so høvdu tey verið dunkað á búkin. Edvard Joensen loypur við báðum beinum í somu felluna og brúkar tey (annars sera dugnaligu og kompetentu) hægstu em-



bætisfólkini og nakrar politikkarar sum váttan fyri sínum pástandi um, at nýggja fyrisitingin ikki skal duga.

Tað stendur sjálvandi onga staðni í stýrisskipanarlógini, at hon krevur eina størri umsiting. Men hon sigur fyri tað fyrsta, at løgmaður og landsstýrismenn sita fyri málsøkjum sínum hvør sær, og at løgmaður hevur eftirlit við, at hvør einstakur landsstýrismaður situr fyri sínum málsøki á lógligan og fullgóðan hátt. Haraftrat verður sagt, at løgmaður og landsstýrismenn hava rættarliga ábyrgd av fyrisitingini av teimum málsøkjum, sum løgd eru til teirra. Henda ábyrgdin er nærri ásett í lógini um ábyrgd landsstýrisins. Oman á alt hetta setur løgtingið eina tríggja manna nevnd, landsstýrismálanevndina, at hava eftirlit við, at starv landsstýrisins verður útint á lógligan hátt.

Um tað er rætt, sum Kjartan Hoydal sigur um tey 10 embætisfólkini, at tey skulu hava hildið, at tann gamla umsitingin hevði kunnað tryggjað landsstýrismonnunum nøktandi trygd eftir nýggju fyrisitingarlógini, eftir at tann kollektiva skipanin var avloyst av landsstýrismannaábyrgdini, so átti helst bert eitt av teimum at verið eftir í landsumsitingini. Eg hugsi, at allir landsstýrismenn vóru samdir um, at tá ið tær nýggju reglurnar um landsstýrismannaábyrgd fóru at koma í gildi (eitt ár eftir, at sjálv lógin kom í gildi á ólavsøku 1995) so var tað teirra politiska lív um at gera, at teir høvdu eina styrkta umsiting, sum kundi ráðgeva teimum á fult nøktandi hátt. Hetta váttar eisini Jóannes Eidesgaard í greinini í Sosialinum.

Sostatt vóru tað júst tær nýggju ásetingarnar í stýrisskipanarlógini, sum gjørdu, at tað varð tvingandi neyðugt at fáa eina broyting í umsitingini.

**Eilif Samuelsen**
**fyrrv. landsstýrismaður**

# Yvirlýsing frá 7-mannabólkinum

7 mannabólkurin, sum umboðar umleið 32 fakfeløg, heitir á Fíggjarmálastýrið, um at taka samráðingarnar uppaftur við Føroya Lærarafelag.

Landsins myndugleikar hava ábyrgd av, at øll børn ganga í skúla. Sum støðan er í dag, ganga fleiri børn og mala fyri vág og vind, uttan eftirlit av vaksnum fólki, og tað kann fáa álvarsligar fylgir.

Signar á Brúnni, landsstýrismaður, sigur í fjølmiðlunum, at hann tekur undir við krøvunum hjá Føroya Lærarafelag, so tað er at undrast á at Fíggjarmálastýrið ikki eisini ger tað. Tað er sum høgra hond ikki veit hvat vinstra ger.

Løgtingið hevur viðtikið eina nýggja fólkaskúlalog, sum áleggur limunum hjá Føroya Lærarafelag at fylgja. Lógin viðførir m.a. at lærarnir fáa álagdar fleiri uppgávur, enn teir hava í dag. Tað sær út sum, at Føroya løgting hevur viðtikið eina lóg, uttan at vita hvat hon inniber fyri limirnar hjá Føroya Lærarafelag. Ella er ætlanin hjá Føroya løgtingi framyvir við lóg at áleggja fleiri arbeiðsuppgávir til starvsfólk, uttan at hugt verður eftir arbeiðsbyrðuni sum er?

Tað er ábyrgdarleyst av Føroya løgtingi, at hava viðtikið eina lóg, fyri síðani at leggja lógina fyri sáttmálapartarnar at trætast um, og sum nú er endaði í arbeiðssteðgi.

Í samband við arbeiðssteðgin, veitir 7-mannabólkurin Føroya Lærarafelag sín fulla stuðul.

Tórshavn, 15. mars 2000

**Sjúkrasystrafelag Føroya**
**Havnar Arbeiðskvinnufelag**
**Starvsmannafelagið**
**Havnar Arbeiðsmannafelag**
**Havnar Handverkarafelag**
**Føroya Arbeiðarafelag**

Lesið eisini Sosialin á Internetinum

www.sosialurin.fo



HYGG & HOYR Fríggjadagur 17. mars

# Kári skrivar sang til TV3

*Mánadagin byrjar nýggjasta sjónvarpssendingin hjá TV3, Det Perfekte Kup, sum eisini hevur okkurt føroyskt í sær*

Jákup Mørk

Tað er nevnliga soleiðis, at tað er, tann á ólavsøku so vælkendi, Kári Jacobsen, sum hevur skrivað eyðkennislagið til nýggju sendingina.

Sum áður nevnt í Sosialinum, so hava framleiðslufólkini fingið ongan minni enn mega stjørnuna, Grace Jones, sum bæði hevur roynt seg sum sangara, model og filmssjónleikara, at leggja rødd til lagið hjá Kára, so vónandi spyrst okkurt gott burtur úr hesum.

Kári er tó ikki einasti føroyingurin, sum hevur ein fingur við í ljóðsíðuni á hesi sending, sum sigst at vera største projektið hjá TV3 í løtuni. Tað er nevnliga runavíkingurin, Óli Poulsen, sum hevur ljóðblandað tónleikin í eyðkennislagnum.

### Kann fara víðari

Hvørja lagnu henda sending hjá TV3 fær, er ilt at siga, men framleiðararnir ætla helst, at sendingin skal vera somikið góð, at konseptið kann seljast øðrum rásum.

Tað er jú soleiðis í sjónvarpsheiminum, at hevur ein støð »uppfunnið« eitt slag av sendingum, ber ikki til hjá øðrum rásum at gera eina líknandi sending, uttan at lata nakra samsýning fyri hetta.

Verður sendingin væl umtókt, og TV3 megnar at selja hana til aðrar støðir, fylgir sangurin hjá Kára við, og vónandi kann eitt slíkt framtak vera við til at seta meira ferð á yrkisleið hansara sum tónleikari og sangskrivari.

### Samstarv og kapping

Um sendingina, Det Perfekte Kup, er annars at siga, at hon í stuttum snýr seg um, at trý fólk í felag skulu vinna fram til eitt pengaskáp, har ein millión krónur eru goymdar.

Tá tey í felag hava vunnið seg fram við fellum av alskyns slag, heldur samstarvið tó uppat, tí nú ræður um at vera fyrstur út í bilin, sum skal nýtast í flýggjanini.

Bygningurin, sum verður nýttur til sendingina, er nevnliga so snildisliga innrættaður, at tað bert er tann eini luttakarin, sum sleppur út aftur úr honum, tó at allir sleppa inn.



ÚTsjón - um loftmiðlar okkara

# Í hesi samráðingatíð



Steintór Rasmussen, lærari, skrivar

Ragnar í Vík er óførur. Óansæð um Føroya Landsstýri fær ein góðan sáttmála við danir, ella um Føroya Lærarafelag fær ein góðan sáttmála við Fíggjarmálastýrið.

Fullveldið ella ikki, ársverk ella ikki. Tað er hugaligt at síggja at onkur kempar fyri sakini.

Løtan sunnakvøldið í heiminum hjá Ragnari var eftir mínum tykki fyrimyndarlig. Ein góð søga, sum samstundis varð væl filmað, klipt og sett saman.

Men countrysangarin í Haldórsvík hevur eisini eina áhugaverda søga. At hann opin og erliga, uttan tó brúka tann grova pensulin, kann greiða frá kenslum og longsli, og endurgeva hesar í samrøðuni og sangunum er rós vert. Og tað allarbesta av øllum. Í Ragnari eiga føroyingar eisini ein mann, sum ágrýtin stríðist fyri at verða hoyrdur uttanfyri landsoddarnar. Ein mann, sum hevur skilt, at tað stóra arbeiði er ikki at innspæla ein fløgu, men at selja vøruna. Ein úrmæling, sum í cowboyhatti og við telduni roynir eydnuna.

### Kameraútvarp

Petur Jacobsen, sum eisini var í Balsalt sama kvøldi, hevði eisini eitt gear, sum kanska fleiri í samfelagnum ongantíð hava verið í. Evnið var hárskapan.

Um tað týdningamesta var mótin, mentanin ella kappingin, fann eg ongantíð útav. Men sum hyggari var tað forvitnisligt at fylgja gongdini og til seinast at síggja úrslitið.

Tað er stuttligt tá sjónvarpið sleppur at vera eitt sindur nærgangandi, sum eitt loyniligt eyga, ið kagar inn í eina púra ókenda verð.

Til Innskot er at siga, at hesin formurin fyri sjónvarp riggar bara viðhvørt. Eitt sindur meiri átti at verði gjørt burturúr stjóranum á Norðurlandahúsinum, Helgu Hjørvar. Hennara søga og hennara hugsan um mentanarlív, er í sjálvum sær stak áhugaverd. Men ein non-stop samrøðu á skandinaviskum talar neyvan til vanliga føroyingin.

Kameraútvarp fer ongantíð at vera meira enn tað næstbesta.

Tróndur Djurhuus tók í Krosskasti pulsin á okkara fremstu politikarum. Hvussu hart bankar hjartað fyri fullveldinum nú samráðingarnar við danir skulu byrja? Sendingin var aktuel og hvat pallseting og innihaldi viðvíkjur eisini væleydnað.

### Journalistisk síðuspring

Meðan Tróndur mikukvøldið fór seriøst til verka, so haldi eg, at ummælarin og kritikarin í Útvarp Føroya, Høgni Djurhuus, skuldi havt meiri sjálvkritikk.

Øðrvísi tíðindasendingin á midnátt leygarkvøld var upprunaliga eitt gott hugskot. Og speisemi og skeivir vinklar er tað framvegis pláss fyri. Spurningurin er bert, um tíðindasendingin í nattarravnunum er kreativt skemt, ein leiðari hjá ÚF, eitt hjartasuff, eitt journalistisk síðuspring ella persónligur peikifingur...

Í míni verð er tað, av einari kendari útvarpsrødd, sera óseriøst at blanda mannarættindi og forfylging, týning av kurdum og tjetenum, krígsførslu og vápnahandil uppí aktuella fullveldismálið.

Eg havi stóra virðing fyri teimum tíðindafólkunum, sum megna at gera viðkomandi sendingar, sum venda ranguna út eini sminkaða samfelagsfasadu. Og ikki minst fyri teimum tíðindafólkum, sum vilja tæna sak teimum kúgaðu. Men eg haldi at Høgni Djurhuus átti at kent málbólk og vitjunartíð.

Ein møgulig føroysk handilsavtala við russar og turkar, sum við ágangi og forfylging týna sínar minnilutar, er ein relevantur spurningur, sum journalisturin á átti at sett á røttum staði og til rætta tíð. At koma við grovum skuldsetingum og gera gjøldur burturúr einum so álvarsamum evni, burdi hann kent seg ov góðan til.

Lurtararnir á midnátt eru fyrst og fremst kátir ungdómar og sendari og móttakari eiga at vera á somu bylgjulongd.

ÚTsjón Marna Jakobsen, Steintór Rasmussen, Annika Joensen og Eyðun Joensen skiftast um at skriva ÚTSJÓN